## Insidara-handil í Sveis

Fyrrverandi nevndarformaðurin í Swiss-com, Marcus Rauh, er nú ækærdur fyri insidarahandil við partabrøvum hjá fyritøkuni. Tveir dagar áðrenn stjórnin almannakunngjørdi einskiljingarætlanir sínar, keypti Rauh partabrøv í fyritøkuni, og ikki óvæntað hækkaði kursurin nógv, tá einskiljingarætlanirnar vórðu almannakunngjørdar. Sjálvur váttar Rauh, at hann keypti partabrøvini, men hann leggur dent á, at hann einki visti um einskiljingarætlanirnar

## 19,3% fleiri um flogvøllin

Tilsamans ferðast 17.739 fólk um flogvøllin í Vágum í september mánaði. Hetta eru 19,3% fleiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Talan er um framgongd á øllum leiðum, Ísland tó undantikið. Størstur hevur vøksturin verið í Danmarkar-flúgvingini, har ferðafólkatalið øktist við 17,4%. Fyrstu níggju mánaðirnar í ár hava 164.681 fólk ferðast um flogvøllin. Hetta eru 13,3 fleiri enn í fjør, tá samlaða talið var 145.397. Talið av flogførum, sum eru komin og farin um føroyska flogvøllin er higartil í ár 5.155.




FJM í Runavík:

# Heildarloysnir til vinnuna úr



*Frithleif Olsen á egnari skrivstovu á FJM í Runavík. Út gjøgnum gluggan sær hann yvir á rækjutrolaran, Havborg, sum nú er um at vera klárur aftur til fiskiskap*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Frithleif Olsen, leiðari á FJM, sigur, at styrkin hjá maskinverkstaðnum í Runavík er, at felagið hevur gott og dugnaligt fólk, og at hesi alla tíðina hava útvegað sær serkunnleika innan framleiðslu av útgerð til fiskiídnaðin. - Vit hava soleiðis loyst óteljandi uppgávur fyri fiskavirkir, fiskiflotan og onnur, sum hava leitað sær til okkara um ráð og loysnir, bæði stórar og smáar, sigur hann**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið FJM, sum er maskinverkstaðurin við Fjøruvegin í Runavík, er stovnað í 1986, og í fleiri ár átti felagið hølini, har SD-Beding er í dag.

Fyri nøkrum árum síðan keyptið felagið stóra og rúmliga bygningin, har Eysturoyar Heilsøla áður húsaðist. Gólvhæddin í hesum bygningi er ikki minni færri enn 2450 fermetrar, umframt skrivstovuhølir, matarhøll og onnur høli í ovaru hæddini, har Sjókaféin eisini húsast.

Í bygninginum er pláss fyri øllum virkseminum hjá felagnum á einum staði, og tað er eisini ein stórur fyrimunur, at hesin bygningur eins og hin gamli, sum felagið upprunaliga átti, liggur dygst við havnalagið í Runavík.

Høvuðspersónurin aftan fyri FJM hevur síðan byrjan verið Frithleif Olsen í Rituvík.

**Løgdu saman**

Við endan av 2004, tá ið FJM í Runavík og Tórshavnar Skipasmiðja avgjørdu at leggja saman frá 1. januar 2005 at rokna, vóru teir fýra, ið áttu felagið við Frithleifi sum høvuðspartaeigara. Hinir tríggir vóru Jóhan Hendrik Olsen, Petur Jacob Petersen og Arni Carlsen.

Maskinverkstaðurin hevði í eitt langt áramál samstarvað við Tórshavnar Skipasmiðju, og nú varð hildið, at tíðin var komin til samanlegging.

Partarnir hildu, at ein slík samanlegging hevur stóran týdning fyri kappingina við umheimin. Mett varð, at við dygdunum hjá teimum tilsamans 250 starvsfólkunum gjørdist førleikin at veita fiskivinnuni á landi og skipaflotanum annars heildarloysnir uppaftur størri enn áður.

Uppgávan hjá FJM hevur øll árini verið at veita fiskivinnuni ymiskar loysnir – og heildarloysnir – úr rustfríum stáli. Felagið hevur lagt seg eftir nýhugsan og at menna nýggjar vørur úr rustfríum stáli – við bondum, pavnum og framleiðslutólum til fiskiídnaðin.

FJM hevur ásannað týdn-